Vágs Kommuna

# KUNNGERÐ UM RUDDING

Vágs kommuna hevur avgjørt at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1 stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 1. september 2007, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**VÁGS KOMMUNA**
**OG**
**SÝSLUMAÐURIN**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Happadráttargrunnurin

Næsti fundur í Happadráttargrunninum verður í oktober 2007. Í tí sambandi verður gjørt kunnugt, at søkjast kann um stuðul úr grunninum.

Endamál grunsins er at veita stuðul til nýskapandi og nýhugsandi tiltøk fyri brekað, sum koma mongum til góða. Ikki ætlað almennum stovnum, ið fáa játtan á fíggjarlógini.

Umsóknir kunnu sendast til:

**Happadráttargrunnurin**
Almanna- og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknirnar skulu vera ráðnum í hendi í seinasta lagi 20. september 2007.

**Happadráttargrunnurin**
**– Grunnurin ætlaður brekaðum**

# Lýsing eftir handverkarum, arbeiðsfólki og maskinførara

Søkt verður eftir handverkarum, arbeiðsfólki og maskinførara til Sp/F WestTrading at byrja skjótast møguligt.

Arbeiðið umfatar alt jørð- og betong arbeiði við nútímans Hunnebech forskalling. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur kunnleika til forskallingsarbeiði, koyrikort til lastbil, kranaloyvi E og kunnleika til maskingrevstur.

West-Trading arbeiðir í høvuðsheitum í miðstaðarøkinum, men arbeiðið kann eisini koma fyri aðrastaðni í landinum.

Best er um umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt við einum møguligum arbeiðsholdi.

Góð løn verður goldin til tann rætta umsøkjaran.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til **Sp/F West-Trading**

Magnus Thomsen
Fartlf. 58 33 73
T-postur: wt@post.olivant.fo

almannastovan

# Umsorgararbeiði 2008

Umsóknarfreistin fyri at søkja um fíggjarligan stuðul til umsorgararbeiði 2008 er:

**1. september 2007.**

**Hesir bólkar/tiltøk hava rætt til umsorgararbeiði:**

1. Mattænastu til fólkapensjónistar.
2. Koyritænastu ella vitjunartænastu fyri pensjónistar.
3. Dagtilhald fyri fólkapensjónistar ella minnisveik.

**Umsóknin skal:**

1. Greitt tilskila, hvør søkir um stuðul og stendur fyri tiltakinum ella fyriskipanini.
2. Neyvt lýsa virksemið, ið stuðulin verður søktur til.
3. Neyvt útgreina upphæddina, ið søkt verður um, t.d. í lønarútreiðslur útreiðslur til høli o.s.fr.
4. Upplýsa tal av starvsfólkum, og um hvør hevur ábyrgd av virkseminum.
5. Meta um tiltakið annars og grundgeva fyri tí ágóða, sum pensjónistar kunnu fáa av virkseminum.

Annars verður víst til kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorgararbeiði, broytt við kunngerð dagfest 19. mai 2006. Henda er at finna á www.logir.fo undir Almannaverk - Almannaviðurskifti annars.

**Umsókn skal sendast til:**

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
110 Tórshavn

**Umsóknirnar verða avgreiddar í seinasta lagi 15. desember 2007.**




# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Viðareiðis skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 at byrja 1. september 2007.**

**Søkt verður eftir:**
- Einum lærara á umleið 20 – 24 tímar um vikuna

**Tann, ið settur verður skal:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**
- donskum í 3. flokki
- støddfrøði í 4. og 5. flokki
- føroyskum og náttúru/tøkni í 6. og 7. flokki
- tónleiki
- serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Lærarautbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Løn**
Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsókn**
Umsókn við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 28. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid



# Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 19.000 km. Hevur m.a. ljós leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, klimaanlegg, o.m.a. Nýprísur: uml. 345.000,-.

Til sølu fyri **einans 259.000,-**

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**